17 Sangarar á konsertferð til Íslands

Útbjóðing

Farmaavgreiðsla í Nólsoy

Strandfaraskip Landsins fara við hesum at bjóða út rakstraruppgávuna av farmaavgreiðsluni í Nólsoy.

Uppgávurnar hjá farmaflutningsdeildini
Farmaflutningsdeildin skal veita leiðslúni eina tvsli tagóða fyrisiting innan farmaflutning, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan farmaflutning.

Uppgávurnar hjá avgreiðsluni
Uppgávurnar hjá avgreiðsluni í Nólsoy, sum er undir farmaflutningsdeildini, eru:
- Farmaavgreiðsla
- Skipaavgreiðsla
- Skriva farmabrev
- Tryggja at samsvar er millum farm og farmabrev
- Farmuppgerð

Førleikakrav
Vit rokna við, at tú, sum skal rokja uppgávurnar, er:
- Fyrikennandi
- Álitandi og rokin

Setanartreytir
Starvið verður sett sambart avtalu.

Umsóknir
Umsókn skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyrituknni í hendi í seinasta lagi 12. mai 2003.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Heina á Borg, farma-flutningsdeildara, á Tel 343060 ella t-post: *lub@sl.fo*.

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.sl.fo

Dýrabiðjudagshalgun a fara 17 Sangarar úr Klaksvík til Íslands á konsertferð

KONSERTFERÐ
Solby A. Eliasen

Kamarkórið 17 Sangarar fer til Íslands á konsertferð um Dýrabiðjudagshalguna

Tvær konsertir verða á ferðini. Onnur verður í Hvolsvelli á Akranesi, har kórið kemur at hava konsert saman við einum kamarkóri úr Hólmavík. Og hin verður í konserthøllini í Kópavogi. Sunnudagin er so ætlanin at vitja brøðrasamkomuna Núpalind í Kópavogi.

Við á ferðini verða eisini Monika Stauss Joensen og Helga H. Gerðalið, sum fara at spæla klassiskan tónleik á ávíkavist violin og klaver.

Í sambandi við ferðina verða tað tvær konsertir í Føroyum. Ein í Runavík mikukvøldið 7. mai kl. 20 og hin í Ósáskúlanum í Klaksvík 9. mai kl. 20.

Men tá verða tað ikki bara 17 Sangarar, sum luttaka. Í Runavík verður kvinnukórið Suð eisini við og í Klaksvík kemur Barnasangskúlin við afturat hinum báðum.

Ein snotulig skrá er gjørd til konsertirnar bæði í Føroyum og Íslandi. Í skránni hevur partur av føroyska vinnulívinum saman við Klaksvíkar kommunu at latið lýsingar frá sær til skránna og við hesum eisini stuðlað ferðini hjá kórinum. Og tað fegnast tey um. Hesar fyritøkur koma at verða nevndar á eini plakat, sum verður gjørd í sambandi við túrin og so sjálvandi eisini í skránni.

Seinastu árini hevur kamarkórið 17 Sangarar verið uttanlanda so gott sum á hvørjum ári. Eisini hevur kórið havt vitjanir av ymiskum, útlendskum kórum, sum samband hevur verið við - eitt nú úr Danmark, Svoríki og Íslandi.

17 Sangarar hava vitjað í ymsum býum í Danmark, í Noreg har tey millum annað hava sungið í Nidaros dómkirkjuni fyri fullsettum høli.

Í fjør gekk leiðin til Norrkøping í Svoríki, sum er vinarbýur hjá Klaksvík, og vóru gestir hjá Musikalska Selskapets Kammerkør. Á hesum túri varð eisini ein steðgur gjørdur í Danmark. Og í 2001 vitjaði kórið Aberdeen.
Og nú fer kórið sostatt til Íslands, har steðgað verður frá 16. til 19. mai.

Her fæst vitan og undirhald ...

ÆLABOGIN
Mánaðargjald fyri Ælabogan, við 24 rásum 269,-

BLÁI
Mánaðargjald fyri blá pakkan, við 18 rásum 169,-

REYDI
Mánaðargjald fyri reyða pakkan, við 13 rásum 209,-

Canal+ pakkin er ein iskoytispakki
CANAL+ CANAL+ BLÁ CANAL+ GUL CANAL+ ZAP
Mánaðargjald fyri Canal+ pakkan, við 4 rásum 219,-

GULI
Mánaðargjald fyri gula pakkan, við 3 rásum 129,-

Kortleigugjald:
Halvarkort kostar kr. 150,- um halvárið
Gjaldið verður krevt fyrsta ferð, gjaldið verður fyri rásapakkan, og ikkan hvørn 6. mánaðu.

SAS LIGAN
FORMEL 1
Tel 340340
www.televarp.fo



Ett rh t lm tt
n tt run v r ur 2 r

GL SST V N

T l 31 75